UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **19. august 2021**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 21/08502-19**

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-017/2021 eftir § 52 a í Tingskipanini frá Anniku Olsen, løgtingskvinnu, um starvfólkatrot og løn undir útbúgving, settur Jenis av Rana, landsstýrismanni í uttanríkis- og mentamálum.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrismaðurin í sambandi við starvfólkatrotið á eldraøkinum?
2. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at geva starvfólkum á eldraøkinum løn undir útbúgving?
3. Arbeiðir útbúgvingarráðið við nøkrum ítøkiligum uppskotum viðvíkjandi løn undir útbúgving til heilsuhjálparar?
4. Eru nakrar ætlanir um at stytta arbeiðsvikuna hjá starvfólkum, ið arbeiða í skiftandi vaktum?

Svar

Til 1: Frágreiðingin hjá Búskaparráðnum vísir á, at økt trýst verður á tænastum á eldraøkinum komandi árini, og at neyðugt verður at seta inn á fleiri økjum. Tørvur er millum annað á at útbúgva fleiri starvsfólk til økið. Hetta er ein avbjóðing, sum eg taki í álvara, og arbeiðið við at betra um møguleikan at taka útbúgving innan økið verður raðfest komandi tíðina í ráðnum. Ætlanin er at taka fleiri lesandi inn á heilsufakligu útbúgvingarnar í 2022 enn í 2021.

Til 2: Møguleikin fyri at geva starvsfólkum á eldraøkinum løn undir útbúgving er umrøddur, og verður framvegis kannaður.

Til 3: Sum nevnt verður møguleikin fyri at veita starvsfólkum á eldraøkinum løn undir útbúgving framvegis kannaður. Harumframt verður arbeitt við ítøkiligum uppskoti um at førleikameta starvsfólk, sum hava drúgvar royndir á økinum.

Til 4: Talan er um eitt arbeiðsmarknaðarmál, og sostatt ikki um økið, sum landsstýrismaðurin í uttanríkis- og mentamálum varðar av.

UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður